

# Avtalað løn til fyritíðarpensjónistar

almannaverkið

## Avtalað løn til fyritíðarpensjónistar

Hevur tú hug at luttaka á arbeiðsmarknaðinum, hóast tú hevur munandi skerjingar í arbeiðsførleikanum? Hug at verða partur av einum arbeiðsumhvørvi og at hava starvsfelagar? Fyriskipanin um avtalaða løn til fyritíðarpensjónistar kundi verið ein møguleiki.

Tú kanst saman við einum arbeiðsgevara gera avtalu um fyrifallandi uppgávur, sum tú kanst vera við til at útinna. Talan vil ikki verða um vanligu uppgávurnar hjá starvsfólkinum, men fyrifallandi uppgávur, sum samtíðis eru gagnligar fyri arbeiðsplássið.

Lóggávan ger tað møguligt hjá einum fyritíðarpensjónisti at gera eina avtalu við ein arbeiðsgevara á vanliga arbeiðsmarknaðinum um eina serliga arbeiðsfyriskipan.

Møguleikarnir eru nógvir fyri hvat starv tú kann átaka tær. Sum dømi kann nevnast at hjálpa við at gera kaffi og halda køkin, hjálpa á einari goymslu ella annað fyrifallandi arbeið, ið tú hevur hug og førleika til.

## Hvør er í málbólkinum?

Í málbólkinum fyri fyriskipan um avtalaða løn, eru fyritíðarpensjónistar, sum vegna skerjing í arbeiðsførleikanum ikki er mettir at hava restarbeiðsevni, sum kunnu nýtast á arbeiðsmarknaðinum undir vanligum treytum. Hettar merkir, at viðkomandi skal fáa hæstu fyritíðarpensjón.

## Treytir

Talan skal verða um arbeiðsuppgávur, sum eru at meta sum fyrifallandi arbeiði á einum arbeiðsplássi á vanliga arbeiðsmarknaðinum. Og arbeiðstíðin kann í mesta lagi verða 15 tímar um vikuna.

Almannaverkið skal vátta, at viðkomandi er fyritíðarpensjónistur. Váttanin fæst við við at venda sær til Almannaverkið.

## Hvørjir partar gera avtaluna?

Tað er fyritíðarpensjónisturin sjálvur og arbeiðsgevarin, sum í samráð við viðkomandi fakfelag gera avtalu um løn til eina serliga arbeiðsfyriskipan. Í avtaluni eru viðurskifti um løn og arbeiðstreytir annars, sum til dømis arbeiðstíð.

## Lógarheimild

Avtalað løn til fyritíðarpensjónistar verður gjørd sambært § 24 í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.



# Fá meira at vita

Vilt tú hava meira at vita um møguleikarnar, kanst tú seta teg í samband við Viðskiftadepilin hjá Almannaverkinum:



Almannaverkið
Viðskiftadepilin
Smyrilsvegur 20
Postrúm 3096
Fo -110 Tórshavn

Tlf. 36 00 00. Faks 36 00 01
av@av.fo
www.av.fo

## Viðskiftadepilin Norðoyggjar

Klaksvíksvegur 78A, FO-700 Klaksvík

## Viðskiftadepilin Eysturoy

Heiðavegur 57, FO-610 Saltangará

## Viðskiftadepilin Tórshavn

Smyrilsvegur 20, FO-110 Tórshavn

## Viðskiftadepilin Suðuroy

Sjógøta 3, FO-810 Tvøroyri

almannaverkið

Dagført februar 2014